# Nú verða fleiri tilboð at velja millum

**Bónus hevur latið upp fimta handilin í Miðvági. Nógv fólk vóru og keyptu í gjár, og tá latið varð upp í morgun kl. 9 vóru fyrstu kundarnir eisini klárir uttanfyri dyrnar**

HANDIL
*Snorri Brend*
*Myndir: Jens Kr. Vang*




*Nógv fólk vitjaðu handilin í gjár, tá hann lat upp. Í morgun vóru Elin (hm.) og Aud Johannesen úr Miðvági fyrstu kundarnir*

**Vágar:** - Hetta eru eini deilig høli – so ljós og so rúmlig!

Fyrsti kundin í nýggja Bónus-handlinum í morgun vóru Elin og Aud Johannesen úr Miðvági.

Tær hava við spenningi bíðað eftir at hesin nýggi og stóri handilin skuldi lata upp eisini í Vágum.

Tað gjørdi hann so á fyrsta sinni í gjáramorgunin. Men í morgun kl. 9 vóru tær báðar á staðnum, tá dyrnar vórðu lætnar upp.

Báðar vóru tær á einum máli um, at hetta er ein góður handil at keypa í.

Alt er so ljóst herinni, og her er úrvalið eisini sera stórt, siga tær báðar við ein munn.

Tær fegnast eisini um, at handilin hevur hugsað so nógv um børnini. Í fyrsta lagi eru serstakir innkeypsvognar til børn, og í øðrum lagi er eitt rúm, har børnini kunnu hyggja eftir teknifilmum, ta tíðina tey vaksnu keypa seg lidnan í handlinum.

Umframt henda handilin í Miðvági og tann stóra handilin í Havn, kann nevnast, at Bónus eisini rekur handlar í Klaksvík, Glyvrum og á Tvøroyri.

### Gamalt ynski

At Bónus nú letur upp hesa deildina í Vágum er eitt gamalt ynski hjá handilsfyritøkuni.

Stjórin, Niels Mortensen hevur áður sagt við Sosialin, at longu áðrenn Vágatunnilin lat upp fyri trimum árum síðani, vóru hugsanir frammi um hetta sama.

Teir valdu tó at bíða eitt bil, fyri líkasum at síggja, hvussu alt fór at útvikla seg í Vágum. Nú mettu teir so, at stundin var komin til at lata henda handilin upp.

Og handilin er sera rúmligur og ljósur, og sum kundarnir eisini bíta merki í beinanvegin. Men hvussu er so við prísinum?

Jú, sigur Aud. – Hann er í lagi.

Út frá tí, sum eg havi keypt her í morgun, so kann eg bara siga, at prísurin, hann er í lagi.

Vanliga hevur hon keypt í Keypsamtøkuni, men nú hevur hon fingið ein møguleika aftrat.

Nú fari eg at hyggja meiri eftir prísunum og teimum tilboðunum, sum hesir báðir handlarnir fara at geva okkum, sigur honum.

Frammanundan hevur hon verið noydd at fara av oynni, um hon skuldi hava fatur á góðu tilboðunum hjá Bónus. Men lítil sparing hevur kortini verið í hesum, tí hon hevur skula goldið bæði bensin og fyri at koyra gjøgnum Vágatunnilin.

- Nú eru tilboðini beint við hjá okkum, og tað haldi eg er í fínasta lagi, sigur Aud.



*Tað er bæði ljóst og rúmligt inni í nýggjasta handlinum hjá Bónus. Tað leggja kundarnir eisini merki til*

# Úr gamla í nýggja Emmaus




*Við triðseinasta møtið í gamla Emmaus sang eitt kór við teimum ungu fólkunum. Hesi eru framtíðin í missiónshúsinum*



*Nógv fólk hava havt sína trúføstu gongd í gamla Emmaus. Húsið hevur nú tænt fyri seg, og tí verður nýggja Emmaus tikið í nýtslu komandi sunnudag*

**Bygningurin hjá Emmaus í Klaksvík verður tikin í nýtslu sunnudagin - 85 ár eftir at tað verandi missiónshúsið varð vígt. Á møtinum verður sagt farvæl við tað gamla, samstundis sum farið verður í tað nýggja missiónshúsið**

SAMKOMUR
*Orð/myndir: Snorri Brend*

**Klaksvík:** Komandi sunnudagur verður serstakur fyri øll tey, sum hava og hava havt sína dagligu gongd til møtir og onnur tiltøk í Emmaus.

Henda dagin dagin verður nevniliga seinasta møtið hildið í Gamla Emmaus-bygninginum. Møtið byrjar kl. 18 eins og vanligt hevur verið.

Ætlanin er, at møtið skal verða so vanligt sum møguligt, men høvið verður tó givið fólki at minnast aftur á tey mongu góðu árini í gamla húsinum.

Tá hetta møtið er liðugt verður síðani farið inn í nýggja Emmaus, sum er bygt beint við síðuna av. Har verður boðið til eina hugnaliga samveru og ein góðan bita, samstundis sum nýggja húsið verður tikið í nýtslu.

Gamla Emmaus varð vígt 12. december 1920. Tað merkir, at síðsta møtið í húsinum verður dagin fyri 85 ára føðingardagin.

Hetta er eitt av elstu missiónshúsunum í landinum og hevur tænt væl fyri seg. Enn gongur tó ein tíð, áðrenn gamla húsið verður tikið niður.

Nú farið verður yvir í nýggja bygningin, er tað í fyrstu atløgu kjallarin, sum verður nýttur. So hvørt sum ráðini verða, verður miðhæddin, har sjálvur høvuðssalurin skal vera og loftið gjørt.

Kjallarin er tó rúmligur til tey tiltøk, sum húsið er karmur um gjøgnum vikuna, verður sagt.